tíðindablaðið
**sosialurin**
Internet: www.sosialurin.fo

**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov

**Marknaðardeild:** Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen
**Blaðfólk:** Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dánjal Højgaard, Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Høgni Mohr
**Yngd:** Jákup Mørk

**Myndamenn:** Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
**Útgevari, uppseting:** Sp/f Sosialurin
**Bústaður:** Argjavegur 26, Argir

**Postadr:** Postsmoga 76, 110 Tórshavn
**Telefon:** 311820
**Telefax.** 314720
**e-mail:** post@sosialurin.fo
**Lýsingar:** lysing@sosialurin.fo
**Prent:** Sosialurin

# Ein herskin kostur

## *Oddagrein*

Tá skelkurin hevði lagt seg eftir fyrsta samráðingarumfar millum donsku stjórnina og Føroya Landsstýri fríggjadagin, vórðu so ymisk tøl send út í vikuskiftinum, at teir flestu føroyigar mugu kenna seg eitt sindur ørkymlaðar.

Fólk hava í fyrstu atløgu torført at skilja, at danska stjórnin hevur gjørt eitt roknistykki, sum sigur, at føroyska samfelagið skal hava 650 milliónir krónur í stuðuli í 63 ár fyri at koma upp í eina bruttotjóðarúrtøku, sum er umleið 20 milliardir krónur.

Og upp aftur torførari hava fólk við at skilja, at danir fara at seta krónutal á, hvat føroyingar í Danmark kosta danska ríkiskassanum. Tað verið seg pensjónistar, arbeiðsleysir føroyingar, krígspensjónin, lærarapensjónir o.s.fr. Hvørjar inntøkur hevur danska samfelaið ikki frá føroyingum og Føroyum?

Nú eru fyri fyrstu ferð av álvara sett tøl á, hvussu nógv ríkisfelagsskapurin kostar í peningi. Eitt fyribrigdi, sum leiðandi og tilvitandi politikkarar altíð hava ávarað ímóti, tí tað gongur báðar vegir. Men lítið er at ivast í, at danska stjórnin hevur gjørt hesar útrokningarnar, eftir at landsstýrið kunngjørdi, hvussu nógv danski ríkiskassin hevði spart í hernaðarútreiðslum, tí danska stjórnin hevur latið NATO byggja og reka hernaðarstøðir í Føroyum.

Hetta er ein gongd, sum formaðurin í Javnaðarflokkinum ávaraði ímóti so seint sum í eini orðaskiftissending herfyri. Hann vísti á, at fóru føroyingar at brúka NATO-tølini, kundi hetta enda við, at danir fóru at gera mótútrokningar. Og tað er júst tað, sum hendi.

Tá hetta er sagt, skal eisini staðfestast, at framferðin hjá forsætisráðharranum í fyrsta samráðingarumfarinum var óstortslig.

- At kalla til tíðindafund, uttan at føroyska samráðingarnevndin visti av tí, var at skapa eitt óheppið samráðingargrundarlagg frá fyrsta degi.

- At kunngera samráðingaruppskotið hjá føroyingum, og kunngera tøl við atliti til tað, er eisini so langt úti, at tað verður torført at fáa ta neyðuga og góða samráðingarumhvørvi, sum er neyðugt, um føroyingar og danir skulu koma til eitt samráðingarúrslit, sum sømir seg og báðir partar kunnu góðtaka.

Men danir hava ikki alla skyldina. Landsstýrið kundi eisini víst størri politiskt snildi. Og halda tað, at eitt samráðingaruppskot kann haldast loyniligt, er bart út alt ov naivt. Samráðingarnar og ætlanirnar raka alt Føroya fólk og tí er mest reiðiligt at spæla við "opnum kortum" frá fyrsta degi.

Nú mugu vit fáa greiðar linjur, og landsstýrið og danska stjórnin skylda føroyingum og dønum frágreiðingar um tey meiri og minni tilvildarligu tøl, sum vit hava hoyrt og sæð seinastu dagarnar.

Tey ørkymla, men at danska stjórnin fór at koma við kravi um eina stutta skiftistíð, kann ikki undra nakaran. Hetta hava stjórnarpolitikkarar sagt áður, og hetta hava danskir andstøðuflokkar sagt. Skulu vit hava fullveldi, skulu vit gjalda, men at danir fóru at vera so kontantir var óvæntað, tá vit hugsa um, hvussu danir hjálpa øðrum tjóðum til sjálvræði. Tí tóktist kosturin í so herskin hetta fríggjakvøldið.

***Sosialurin***

## Viðmerking:

# Kravið til búskaparliga skiftisskipan



Landsstýrið hevur verið í Keypmannahavn og sett fram sítt uppskot til ein nýggjan sáttmála, sum landsstýrið ætlar skal gerast millum fullveldið Føroyar og kongaríkið Danmark. Sáttmálauppskotið skal lýsa, hvussu framtíðarviðurskiftini millum Føroyar (sum "fri og suveræn stat") og Danska Kongaríkið kunnu skipast eftir ynski landsstýrisins.

Her uppií er so eisini kravið hjá landsstýrinum til eina búskaparliga skiftisskipan. Men her hevur rættiligur orðadráttur tikið seg upp, um hvat føroyska kravið til skiftisskipan í veruleikanum ber í sær. Serligur áhugi hevur verið fyri spurninginum um, hvussu langa skiftistíð landsstýrið hevur ætlað sær.

Eftir tí, sum higartil er komið fram, hevur landsstýrið sett fleiri krøv til búskaparliga skiftisskipan:

1) Eftirgeving av skuld til statskassan: **4,4 mia. kr.**

1) Árlig veiting frá danska kongsríkinum **uppá 650 mió. kr.** Henda árliga veitingin skal halda fram, inn til føroyska bruttotjóðarúrtøkan, BTÚ, er vaksin til eina so stóra upphædd, **at tær 650 mió. kr. svara til 3% av BTÚ.** Tvs. at henda veitingin skal halda fram, **inn til BTÚ er komin upp á knappliga 22 mia. kr.** (í dag er BTÚ einar 7 mia. kr.)

**1**) Táið BTÚ er vaksin til eina so stóra **upphædd, at tær 6**50 mió. kr. svara til 3% av BTÚ, skal veitingin minkast burtur eftir 3 árum.

1) Ymiskar tænastur úr Danmark skulu halda áfram ókeypis.

Avgerandi fyri, hvussu long skiftistíðin kann gerast eftir útspælinum hjá landsstýrinum, er tó, hvussu bú**skaparvøksturin fer at verða tey** nógvu komandi árini. Tí kunnu vit seta eitt roknistykki upp, sum vísir skiftistíðina undir ymiskum fortreytum um væntaðan búskaparvøkstur.

Út frá 2) og 3) omanfyri kunnu vit tí seta hesa talvu upp, sum vísir hvussu long skiftistíðin kann gerast, alt eftir hvør miðal árligi búskaparvøksturin verður tey nógvu komandi árini:

| Búskaparvøkstur | Áramál (skiftistíð) |
|---|---|
| 1,5% | 76 + 3 ár |
| 2,0% | 57 + 3 ár |
| 2,5% | 46 + 3 ár |
| 3,0% | 38 + 3 ár |
| 3,7% | 31 + 3 ár |
| 4,0% | 29 + 3 ár |
| 5,0% | 23 + 3 ár |
| 6,0% | 20 + 3 ár |
| 7,4% | 16 + 3 ár |
| 10% | 12 + 3 ár |

**Ilt er at vita, hvør búskaparvøksturin verður tey nógvu komandi** árini.

**Men um vit fara til Hvítubók, so verður sagt har**, at 2 % er ein varislig meting av búskaparvøkstrinum komandi árini. So um vit ganga eftir tí "varisligu metingini" í Hvit**ubók uppá 2 %, so verður skiftistíðin:**
57 + 3 ár = 60 ár.

**H**vítabók vísir eisini á, at miðal búskaparvøksturin fyri árini 1962 — 1999 var 3,7%.

So um vit ganga eftir miðaltalinum uppá 3,7% fyri hetta langa tíðarskeiðið, verður skiftistíðin:
31 + 3 ár = 34 ár.

**S**eta vit vøksturin til tað du**pulta av søguliga miðalvøkstrinum, nevnliga 7,4%, verð**ur skiftistíðin:
16 + 3ár = 19 ár.

U**m vit at enda seta** búskaparvøksturin til tað f**immdupulta av teim 2%, sum Hvítabó**k roknar við**, nev**nliga 10 %, so verður s**kiftistíðin: 1**2 + 3 ár = 15 ár.

Ú**t frá hesum kann s**o ein og hvør sjálvur ger sær sína meining um **tað kravið til búskaparliga skiftisskipan, sum la**ndsstýrið **hevur** sett donsku stjórnini, í **samband við ætlanir** landsstýrisins at skipa Føroyar sum fullveldisríki.

**Hans Pauli Strøm,**
**javnaðartingmaður**

# Íslendska loysnin



Tað er øll orsøk til at fegnast um úrslitið av tí samráðingarfundi, sum landsstýrið hevði við donsku stjórnina fríggjadagin.

At Nyrup royndi at fara upp á tjólegg og vísa danska fólkinum, at hann eisini var ein danskur imperialistur, var einki annað enn ein og hvør kundi rokna við.

Tað stuttliga er, at hann so skjótt datt niður á langlegg, og segði at hann vildi ganga við til at Føroyar gjørdust eitt sjálvstøðugt ríki, men hvat kundi hann annars gera? Hann hevur jú ferð eftir ferð sagt, at hann er ímóti imperialismu bæði í Suðurafrika og Baltalondum, At hann helt fast við danska yvirræði í Føroyum var bert av tí at hann lýðin fylgdi tí meiriluta, sum myndaði stýrið í hesum oyggjum. Ynsktu føroyingar at gerast eitt sjálvstøðugt ríki, so vildi hann, sum ein góður antiimperialistur, ganga hesum ynski á møti.

Føroyingar hava alla orsøk til at rokna við, at vit tí peningaligu uppgerðini viðvíkjandi fáa somu loysn sum Ísland fekk í 1918. Fáa vit ikki tað, so verður mismunur gjørdur ímóti okkum, og so hava vit alla orsøk til at vera misnøgd.

Tann íslendska loysnin gongur í fíggjarmálum út uppá, at roknað verður út hvussu stórar tær árligu veitingarnar frá Danmark eru. Síðan verður sagt, at tað ber ikki til, at eitt frælst ríki fær stuðul frá einum øðrum frælsum ríki, men hin vegin er tað ósømuligt, at tað skal kunna roknast út, hvussu nógv Danmark sparir á síni fíggjarlóg árliga av tí at Føroyar nú hava fingið frælsi. Fyri at sleppa undan hesum verður settur á stovn ein grunnur, sum er so stórur, at renturnar av honum svara til tær árligu veitingarnar frá Danmark. Hesin grunnur verður lagdur í tvær deildir. Onnur helvtin av hesum grunni verður løgd til Danmark, har hann skal verða nýttur til at fremja góða samvinnu millum Danmark og Føroyar. Hin helvtin verður løgd til føroyska fróðskaparsetrið, sum so fer at megna at menna føroyska samfelagið so tað fer at vera kappingarført við onnur ríki.

Hvussu stórur grunnurin skal vera, verður so avgjørt av, hvussu stórar árligu veitingarnar eru til Føroyar. Higartil hava vit roknað við, at tær eru 1300 milliónir, og av tí at rentan er um 5% skuldi grunnurin verið 26 milliardir krónur. Men nú er danska stjórnin komin til, at árliga upphæddin er 1900 milliónir krónur. Hetta merkir, at grunnurin skal vera uppá 38 milliardir krónur, og av teimum skulu 19 milliardir leggjast í Føroyum.

Hetta var tann loysn, sum Ísland fekk, og fáa vit minni, so er tað ikki tann íslendska loysnin vit fáa, og so verður mismunur gjørdur móti okkum, ella við einum fremmandum orði, so eru vit fyri diskriminatión.

Hetta kunnu vit á ongan hátt lata okkum lynda, og vil danska stjórnin ikki ganga við til eina slíka fíggjarliga loysn, so er eingin orsøk til at ganga við til tær bindingar, sum ein sáttmáli av tí íslendska slagnum leggur á okkum.

Sannleikin er nevnliga tann, at vit kunnu saktans tann dagin í dag gera ein sáttmála við Danmark um at vit gerast eitt frælst ríki sjálvt um vit ikki fáa so mikið sum eitt oyra frá teimum. Tann útrokning, sum búskaparráðið fekk gjørt, vísti, at hetta í allarversta føri bar við sær at livikorini versnaðu 20%. Hetta er ikki meir enn eitt og hvørt land kann rokna við nær sum helst, og hetta er nógv minni enn okkara livikor versnaðu tey árini fyrst í nittiárunum, tá vit vóru rakt av eini kreppu, og vit vóru saman við Danmark, sum skuldi hjálpt okkum, men í staðin skumpaði 9000 av okkara landsmonnum út av eggini („Hjælp Danmark - fang en færing“). Tá versnaðu livikorini 40%!

Vit kunnu tí saktans vera íslendsku loysnina fyriuttan. Tá okkara sendinevnd kemur til Danmarkar við hesum uppskoti, so er tað eitt gott tilboð til donsku stjórnina, og kennir hon ikki sína vitjanartíð, so má hon um tað. Tað er ikki okkara problem.

**Zakarias Wang**

# Tøkk

Hjartans tøkk til tykkum øll, ið sýndu samkenslu, tá ið kæra kona, móðir, vermóðir, omma og langomma okkara

**DANIA JACOBINA JACOBSEN**
Nólsoy

doyði og varð jarðað.

Ein serstøk tøkk til tín Heidi fyri ta hjálp, ið tú veitti okkum.

Tøkk til tykkum mongu, ið fylgdu henni til gravar. Tøkk fyri blómur, kransar, brøv og uppringingar og til tykkum øll, ið hjálptu til.

Eisini ein tøkk fyri peningagávur til Føroya felag móti krabbameini.

*Familjunnar vegna*

**Bjarni**





*Fram II og Pelagos, sum hava staðið á sølulista, hava ligið við bryggju stóran part av seinasta árinum, tí eingin áhugaður keypari hevur verið. Í somu viku, sum teir fingu meira enn tvívaldað sildakvotuna, vórðu teir seldir*

# Fingu kvotu at selja

*Í somu viku sum Fram II og Pelagos fingu sildakvotuna meira enn tvífaldaða upp á kostnað av restini av flotanum, vórðu tey seld, hóast tey annars ikki hava verið áhugaverd at keypt*

EDVARD JOENSEN

Tað hevur vakt ans í vinnuni, at Fram II og Pelagos fingu lagt 1.683 tons aftur at sildakvotuni, hóast skipini hava ligið óvirkin við bryggju stóran part av seinasta árinum. Hækkingin er meira enn hálvaaðruferð kvotuna í fjør, sum var 1.100 til hvønn.

Tíðindablaðið Sosialurin fættir, at roynt hevur verið at selt skipini, men eingin áhugi hevur verið at keypt, tí kvoturnar hava verið ov smáar.

Í seinastu viku vórðu sildakvouturnar til føroysku skipini býttar, og Fram II og Pelagos fingu eina samlaða hækking upp á 3.366 tons, sum varð tikin av kvotuni hjá hinum sildaskipunum. Í somu viku vórðu Fram II og Pelagos seld. Hendan hækkingin er, milt sagt, ikki væl móttikin av teimum, sum varða av hinum sildaskipunum.

Onkur teirra, sum stendur nótaflotanum nær, sigur, at tað sær út, sum teir beinleiðis hava fingið kvotuna forerandi frá landsstýrismanninum sum hjálp til at sleppa av við skipini.

Vit hava roynt at fingið eina viðmerking frá Jørgeni Niclasen, landsstýrismanni í fiskivinnumálum, men hann hevur ikki verið tøkur. Heldur ikki hevur hann svarað, tá boð eru løgd til hansara um at ringja aftur.

Skipini eru seld til Klaksvíkar, har svartkjaftaloyvið hjá teimum skal brúkast, meðan makrelkvotan longu er seld avstað aftur til eitt triðja reiðarí.

Hanus Hansen, stjóri í JFK Trol í Klaksvík, váttar, at JFK Trol hevur keypt Fram II og Pelagos. Hann sigur, at skipini vórðu keypt fyri at fáa tey fiskirættindi, skipini høvdu. Svartkjaftaloyvið skal brúkast til at tryggja Nærabergi størri rættindi.

Umframt svartkjaftaloyvi, hava Fram II og Pelagos eisini loyvi at fiska makrel, rossamakrel, sild og gulllaks. Hvussu verður við hesum loyvunum, vil Hanus Hansen ikki siga nakað um í løtuni. Tó sigur hann, at ein avtala er gjørd um makrelloyvini hjá Fram II og Pelagos. At talan skal vera um, at eitt reiðarí, sum eigur nótaskip í Klaksvík, hevur keypt, vil Hanus Hansen ikki siga nakað um.

Spurdur, um tað er rætt, at JFK Trol arbeiðir við at útvega enn eitt skip á stødd við Næraberg, vil Hanus Hansen hvørki vátta ella avsanna nakað. Men hann sigur tó, at tað er ikki aktuelt í løtuni. JFK Trol hevur einki innflutningsloyvi, sigur Hanus Hansen, stjóri.

Um Fram II og Pelagos sigur Hanus Hansen, at teir møguliga fara at fiska rækjur. Teir hava fyrr roynt seg í hesi vinnuni, og tann møguleikin er ikki heilt órealistiskur, heldur stjórin í JFK Trol. Uppisjóvarloyvini fara teir so ikki at brúka, sigur hann. Tey eru ætlað Nærabergi ella í hvussu er til at vinna honum betri rættindi.

Formaðurin í Felagnum Nótaskip, Atli Hansen, sigur, at nótamenn eru betonkiligir við, at millum 400 og 500 tons eru tikin av sildakvotunum hjá hvørjum av hinum nótaskipunum í flotanum og latin tveimum skipum, sum ikki hava loyst seinasta hálva árið.

Hann sigur, at felagið hevur ávarað í móti at lata bátum, sum ikki fiska, størri kvotu. Tí teir, sum eru í vinnu høvdu saktans klárað at fiskað alt, sum er.

# Fara Føroyar fer Grønland eisini

*Enda samráðingarnar millum Føroya Landsstýri og donsku stjórnin við, at føroyingar fáa eina góða avtalu, er eisini hugsandi at grønlendingar gera tað sama, sigur danskur serfrøðingur*

EIRIKUR LINDENSKOV
JOHN JOHANNESEN

– Eg eri vísur í, at vit skjótt fara at hoyra okkurt úr Grønlandi, um samráðingarnar við Føroyar fáast upp á pláss. Í Nuuk eru tey noydd at halda seg til hesa støðuna, og samband er millum føroyingar og grønlendingar í hesum máli, sigur Finn Breinholt Larsen, sum er lektari á Center for Nordatlantiske Studier á Århus Universiteti við Jyllands-Posten.

### Trýstið á grønlendingar økist

Hann sigur, at í Grønlandi hava tey sett ein arbeiðsbólk, sum í løtuni metir um møguleikarnir fyri grønlendskum sjálvstýri, men bólkurin hevur als ikki sama umfatandi arbeiðssetning at arbeiða undir, sum føroyski samráðingarbólkurin, sigur hann.

Grønlandingar vilja fegnir sjálvir føra uttanríkispolitikkin og hava løgregluna og dómsvaldið undir grønlendksa umsiting.

– Trýstið á grønlendingar fer at økjast, men so leingi, Jonathan Motzfeldt er politiskur leiðari í Grønlandi, er tað ikki vist, at loysingin verður, heldur Finn Breinholt Larsen.

### Motzfeldt skilir donsku stjórnina

Við Internet-Sosialin fríggjadagin segði Jonathan Motzfeldt, sum var staddur í forsætismálaráðnum, meðan samráðingarnar vóru millum landsstýrið og donsku stjórnina, at hann helt tað vera gott, at danska stjórnin tosaði erliga í samráðingunum. Hetta segði hann, eftir at danska stjórnin hevði boðað frá, at ein skiftistíð upp á trý til fýra ár er nøktandi fyri Føroyar.

Hann vísti á, at talan er um ógvuliga umráðandi samráðingar, og tí hevur tað týdning, at danska stjórnin, eins og landsstýrið, kemur við einum útspæli til samráðingarnar.



*Jonathan Motzfeldt, landsstýrisformaður*
**Mynd: Jens Kristian Vang**

– Eg havi alla virðing fyri føroyska fólkinum og Føroya Landsstýri, men eg skilji væl tað, danska stjórnin ger. Tað hevði verið órímuligt, um bert landsstýrið skuldi lagt fram upplegg til samráðingarnar.

Hetta merkir bert, at tosað verður opið og erliga í samráðingunum, segði Jonatan Motzfeldt.

Hotel Föroyar
Best Western
Tel. 317500
Hotellið við útsýninum

Danskir gesta-kokkar
Leygarkvøldið 25. mars

Til Matna
Fiskarulla við hummaraurtakremi
Basilikum-kervilsuppa við bakaðum fiskatorni
Alexandrakrapi
Grillaður kalvi við grønmetisfrikassé og eplatorni
Sitrón-mousse við lakaðum berum og frukt

Dinnertónleikur og Hilmar Jan undirheldur
Kostnaður kr. 250,-

Borðbílegging á tel. 317500
Altíð vælkomin á
Hotel Föroyar
Best Western
Tel. 317500